– Nú er bert ein s

- Vit eru so fá fólk, so vit keypa ikki inn í stórum, sigur Páll Olsen, sum saman við konuni rekur einasta handilin í Árnafirði. Fólkini eru ikki so mong í bygdini, men handilin livir í bedste velgående, hóast úrvalið ikki er tað størsta.

BYGDAHANDIL
Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo
Myndir: Bárður Lydersen

Árnafjørður: - Tú, hvussu er tað, Páll. Skuldi John ikki koma aftur í gjár?

- Jú, eg haldi at onkur segði tað!

Tað eru ikki nógv fólk inni í handlinum í Árnafirði. Bert keypmaðurin Páll Olsen og tann eini kundin henda hósdagin í farnu viku, Tóra Mikkelsen.

Tað er kanska ikki so undarligt í, at kundarnir ikki eru fleiri í dag. Tey flestu munnu longu hava keypt tað, tey ætlaðu sær, hóast úrvalið ikki er tað størsta.

Aftrat hesum kemur at klokkan er farin at nærkast hálvgum tólv, og í mongum heimum er døgverðin longu farin útá. Mong av hinum, sum arbeiða í Klaksvík ella aðrastaðni í Norðoyggjum, eta helst ikki døgverðan tá, men bíða til seinni um kvøldið.

Uttan fyri handilin er friðarligt. Ikki eitt menniskja at síggja - líka við undantaki av eini tilkomnari konu, sum er ávegis til einasta handilin í bygdini.

Hesin handilin hevur ikki tað størsta úrvalið av vørum, men har er tó mangt og hvat at fáa til húsarhaldið. Ein veggur er to prýddur við sodavatns- og ølfløskum, meðan ein á tí aftasta vegginum kann síggja bæði sjokolátu, margarin, soya og tílíkt.

Har eru ikki fullar hillar av vørum, men bert nøkur fá stykkir av hvørjum. Ongin orsøk er at hava ov stóra goymslu, tí kundakredsurin er avmarkaður - og aðrir stórir handlar eru í Klaksvík, sum liggur fáar kilometrar hagani.

Hetta hevur tó ikki tikið mótið frá Pálli. Trúfastur stendur hann í handlinum og tekur móti teimum vitjandi. Og hann ger ikki mun á bygdarfólkinum og umboðum frá tíðindatænastuni: Øll fáa somu viðferð - annaðhvørt tey keypa ella spyrja!

Handlar lata aftur

Hesi seinastu árini hevur nógv verið tosað um bygdamenning, serliga á teimum støðunum, har ikki er so væl atkomandi til.

Mong av hesum plássum líða í dag undir tí, at fólkið á plássunum minkar í tali, men samstundis veksur í miðalaldri. Og á onkrum støðum verður enntá tosað um at vandi er fyri at bygdin doyr út.

Her er ofta talan um pláss á útoyggjunum, har ferðasambandið og aðrar tænastur eru ein alneyðugur partur í gerandisdegnum hjá fólkinum. Men hóast nógv hevur verið gjørt fyri at bøta um hetta, hevur tað mangan víst seg at vera í seinna lagi at forða fyri fólkaflytingini.

Á fleiri útoyggjum er ein av hesum tænastum tann sjálvsagdi møguleikin at kunna fara til handils hvønn dag at keypa tað, ein hevur brúk fyri. Men vit hava kortini sæð eina gongd, har hesir smáu handlarnir ikki megnaðu at hava opið og tí lótu aftur.

Ein bygd, sum enn ikki er merkt av hesum, er júst Árnafjørður. Hóast bygdin liggur fáar kilometrar frá stórplássinum Klaksvík, so hevur bygdini kortini eydnast at varðveita ein av hesum tænastum, nevniliga tann gamla handilin í bygdini.

Hann er opin hvønn einasta dag, og hóast tú ikki fært allar vanligar vørur har, so ber kortini til at keypa nakað av tí, sum hoyrir tí vanliga húsarhaldinum til: Kaffi, havragrýn, uppvaskisápa, WC-rullur og tílíkt – alt kortini í sera avmarkaðum tali.

Øll eplini

Tóra Mikkelsen er farin til handils fyri at keypa sær nøkur epli, nú døgurðin skal setast útá. Ikki ein heilan posa, bara nøkur fá kilo av eplum.

Páll er skjótur eftir tí einasta eplaposanum í øllum handlinum, og sum stendur har afturí einum horni. Løtu seinni hevur hann vigað eplini og sagt Tóru prísin.

Hon tekur pengapungin fram og skal til at gjalda, men hyggur so upp. - Tú, lat meg líka fáa ein dunk av soya eisini. Takk, hvat kostar tað?

Páll fer yvir til hyllina og tekur soya-dunkin. Frammanundan vóru tveir slíkir dunkar. Nú stendur bert tann eini eftir.

Handilin er avgreiddur, men Tóra ger eingi tekin til at vilja fara. Eina slíka løtu er altíð gott at práta eitt sindur við handilsmannin.

Jú, John er afturkomin til bygdina. Ein bilur við merkinum "Sosialurin - Úr bygd og bý" er komin til bygdina. Tja, og veðrið er betri í dag enn í gjár. Tá var nógvur vindur og hundakalt. Í dag hevur hann minkað vindin eitt sindur, og hann lovar turt og gott veður teir komandi dagarnar.

- Men vár er einki at hóma, hóast tað er summarmáladagur í dag, eru tey bæði samd um.

Einki skelti

Í øðrum størri plássum er vanligt at handilin - ella handlarnir - hava hvør sítt navn.

Hetta navnið kann vera tað

Lítil elektronikkur finst í handlinum, og tí er tann gamla vektin framvegis í nýtslu, tá eplini skulu vigast.